## Ikki Ingólfur Arnarson?

Tann gamla íslendska søgan sigur, at tann fyrsti landnámsmaðurin í Íslandi æt Ingólfur Arnarson. Hann var norðmaður, og sambært søguni fór hann í land á Ingólfshøfða í árinum 871. Men søgumaðurin Helgi Þorláksson ivast í hesari søguni. Í einum fyrilestri, sum hann fer at halda týsdagin, fer hann at vísa á, at fólk vóru í Reykjavík fyri 871, og tí kann Ingólfur Arnarson ikki hava verið fyrsti maður í Íslandi, soleiðis sum tann gamla søgan sigur.



*Sambært søguni fór Ingólfur Arnarson í land her við Ingólfshøfða*

## Íslendingar drekka meiri

Íslendingar drukku sjey prosent meiri av rúsandi løgi í fjør enn árið fyri, og sambært Vísi var tann dagliga nýtslan var so mikið stór, at tað var næstan upp í tveir stórar tangabilar sum teir á myndini. Hagtølini vísa, at í meðal drukku allir íslendingar oman fyri 15 ár 7,5 litrar av reinum alkoholi í fjør, og tað var 0,3 litrar meiri enn í 2006. Tølini vísa eisini, at íslendingar drekka meiri av sterkum og minni øl nú enn undanfarin ár.

búskapin, at teir ikki kunnu fáa endurvenjing, so at teir sleppa aftur í samfelagið at liva og virka.

Tað er ógvuliga ymiskt, hvussu nógva endurvenjing, hesir sjúklingar hava brúk fyri.

- Summi hava bara brúk fyri at endurvenja ávísar førleikar. Hjá summum er talan um lívslanga endurvenjing.

Summir av hesum eru lammaðir og fáa ikki tosað, men bara nakað so einfalt og lítilátið sum at sleppa til talilærara er ein slík Kanossaferð hjá mongum, at tey gevast á leiðini

### Ynskja sær blóðtøpp

Møguleikarnir fyri at fáa endurvenjing eru so vánaligar, at á fundinum, sum Heilafelagið skipaði fyri, var tað ein, sum beiskliga helt fyri, at tað er nógv fyri, at man skal ynskja sær at fáa blóðtøpp fyri at fáa nakrar sømdir í føroyska heilsuverkinum.

Spurningurin er so bara, nær tilmælini í álitinum kunnu setast í verk.

Marjun Poulsen heldur, at skal nakað koma á skaftið, verður tað neyðugt at lata ábyrgdina upp í hendurnar á ávísum fólki, sum fær hetta øki at arbeiða við meir ella minni burturav.

- Hetta er so umfatandi, at landsstýrismaðurin sjálvir, ella umsiting hansara, hava ongan møguleika at arbeiða við hesum afturat teimum vanligu uppgávunum, tí so fer onki at koma burtur úr.

- Tí verður neyðugt at starvsfólk meiri ella minni burturav fáa til arbeiðis at skipa tilmælini í álitinum.

### Miðstøð í Suðuroy og í Klaksvík

Og álitið, sum landsstýrismaðurin nú hevur fingið at arbeiða við, er rættiliga umfatandi.

Í fyrsta lagi verður mælt til, at tað beinleiðis verður ásett, at øll, sum hava tørv á tí, skulu hava beinleiðis lógarásettan rætt til endurvenjing og venjing til at varðveita teir førleikar, tey hava.

Marjun Poulsen sigur, at ein hugsan er, at gera sjúkrahúsið í Klaksvík og í Suðuroy til venjingarmiðstøðir.

Og nú nýtt ellis-og røktarheim verður bygt í Vági, kann ein partur av ellis-og røktarheiminum á Tvøroyri brúkast til at hýsa fólki, sum eru á sjúkrahúsinum til endurvenjing.

Men mælt verður eisini til at skipa fyri endurvenjing undir Nærverkinum, so at venjing kann fara fram úti í teimum ymsu økjunum.

# lova

- Alt hetta skal ígjøgnum eina politiska viðgerð og hon er ikki byrjað enn, sigur hann.

Men skjótt verður farið undir fíggjarlógina fyri næsta ár og tað fer tann politiski viljin at vísa seg, leggur hann afturat.

Hann sigur sostatt, at nú nýtt landsstýrið er skipað, fer hann at taka málið uppaftur.

Annars fer hann at mæla til at seta eina tíðarætlan upp fyri at nær tey ymsu tilmælini í álitinum skulu setast í verk.

Hvussu langa tíð, vit tosa um kann hann onki siga um, tí tað veldst um, hvussu tann politiska raðfestingin verður.

Hann vísir á, at tað eru eisini nógvar aðrar raðfestingar, sum skulu gerast á øllum økjum og hetta skal so verða ein partur av teirri raðfestingini.

Kortini er tað neyðugt, at nakað skal henda á økinum og tí skal hetta heldur ikki taka allar ævir, leggur hann afturat.

Fyrsta stigið verður at seta eind í Nærverkinum at leggja eina endurvenjingar ætlan til rættis og tað ætlar hann at gera í ár.

- Tað eru so nógv tilmæli í álitinum, at tað er neyðugt at skapa okkum eitt útgangsstøðið fyri at vita, hvar vit skulu byrja og í hvørjari raðfylgju, tey ymsu tiltøkini skulu setast í verk og tað skal hendan eindin í Nærverkinum leggja til rættis, sigur Hans Pauli Strøm.

# Upplýsa ungdómin um rúsevni

**Seinastu tíðina hevur Beinta Joensen, fyribyrgingarráðgevi hjá Bláa Krossi, hildið fyrilestrar á skúlum kring landið og upplýst um rúsevni. Við sær hevur hon havt ein fyrrverandi stikknarkoman**

UPPLÝSING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Vit upplýsa og fortelja um øll onnur viðurskifti, og tá rúsevni er ein partur av veruleikanum hjá føroyska ungdóminum, so eiga tey eisini at verða ráðførd har, sigur Beinta Joensen, fyribyrgingarráðgevi hjá Bláa Krossi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað var eingin moraliserandi peikifingur á lofti, tá Blái Krossur herfyri ferðaðist á skúlar kring landið, og upplýsti ungdómin um rúsevnir.

– Peikifingrar er eitt farin tíð, og tað fangar ikki ungdómin. Ofta hevur tað næstan beint øvugta effekt enn ætlað, vísir fyribyrgingarráðgevin hjá Bláa Krossi, Beinta Joensen, á.

Tískil hevur hon heldur valt at upplýsa ungdómin um teir vandar, sum standast av at rúsevnum.

– Tí, sum hon sigur, so upplýsa og fortelja vit um øll onnur viðurskifti, og tá rúsevni er ein partur av veruleikanum hjá føroyska ungdóminum, so eiga tey eisini at verða ráðførd har, metir hon.

### 9% roynt hash

Við sær kring landið hevur hon havt nakrar faldarar, sum eru bygdir á nøkur tøl, ið ESPAD (European School Survey Project on Alcohol and Other Drugs) hevur funnið fram til. ESPAD er ein stovnur sum umleið 40 lond samstarva um, har upplýsingar um tubbaks-, alkohol- og rúsevnisvanarnir hjá ungum verða savnaðir á einum og sama stað, soleiðis at til ber at samanbera londini.

Tølini í faldarunum, sum varð útgivin í fjørsummar, avdúka millum annað, at 9 prosent av øllum næmingunum í føroysku 9. flokkunum hava roynt hash. Somu kanningar hjá ESPAD av føroysku 9. floksnæmingunum vísa, at 11 prosent av hava roynt at sniffa eitt nú tendraragass.

– Og vit kunnu siga, at tølini ikki passa, men eg meti heldur, at vit mugu fyrihalda okkum til tann veruleikan, tey ungu eru í og ikki tann veruleikan, vit ynskja, sigur Beinta Joensen.

Hennara eygleiðingar, tá hon hevur vitjað á ymsu skúlunum, hava eisini verið, at ein stórur partur av ungdóminum hevur sæð onnur ung sniffa, og tað sama er galdandi fyri hash.

### Stórar freistingar

Beinta Joensen sigur seg vera kløkka av, at heili 9 prosent av føroysku 9. floksnæmingunum høvdu roynt hash, og at 11 prosent høvdu roynt at sniffa.

– Tað merkir, at tað framvegis er spennandi við rúsevnum og at tey eru til at fáa fatur á, sigur Beinta Joensen. Hon metir kortini ikki, at ungdómurin í Føroyum er verri nú, tá tað kemur til rúsevnir, enn hann hevur verið fyrr.

– Nei, tað vil eg ikki siga. Kanska er ungdómurin enn tá frægari nú, tí í dag eru freistingarnar størri og nógv fleiri enn fyri 20 árum síðani, metir Beinta Joensen.

Hon metir kortini, at tað er alneyðugt við slíkum upplýsingartiltøkum, sum Blái Krossur hevur havt kring skúlarnar í síðstuni.

– Stevnurnar og festivalarnir standa fyri framman, og tá er tað umráðandi, at tey ungu hava eina vitan við sær, og eisini eru greið yvir, hvørjar avleiðingarnar av rúsevnum kunnu vera.

### Stikknarkomanur greiddi frá

Til at greiða frá møguligum avleiðingum av rúsevnismisnýtslu, hevði Beinta Joensen danan Christian Werlo við sær. Hann er fyrrverandi rúsevnismisnýtari og stikknarkoman, og hevur verið "clean", sum tað eitur, í nøkur ár. Christian Werlo greiddi frá sínum lívi og royndum við rúsevnum, og eftir hvat skilst dugdi hann sera væl at greiða frá.

Christian Werlo kom úr eini púra vanligari familju, men endaði sum neyðardýr orsaka av rúsevnismisnýtsluni, áðrenn hann kom á rættan kjøl aftur. Tað staðfestir, at ein og hvør kann enda úti í misnýtsluni, áðrenn tú veitst av, og tískil er tað umráðandi, at tú veitst hvat rúsevni eru fyri nakað, og at tú dugir at taka røttu valini. Teir moraliserandi peikifingrarnir hava ikki røttu effektina. Tí ljóðar boðskapurin frá Bláa Krossi til ungdómin í dag: »Valið er títt!«

Til samanberingar kann nevnast, at í mun til hini umleið 40 londini, sum luttaka í ESPAD-kanningunum, stendur væl til í Føroyum. Í meðal hava 21 prosent av næmingunum í tí, sum svarar til 9. flokk í hinum londunum, roynt hash. Og hvat sniffing viðvíkur eru vit áleið á sama støði – eitt prosent omanfyri meðal.

## FAKTA

11 prosent hava roynt at sniffa lívrunnin uppløysingarevni
9 prosent hava roynt hash
0,8 prosent hava roynt ecstasy
0,8 prosent hava roynt kokain
0,6 prosent hava roynt heroin
0,6 prosent hava roynt soppar
0,3 prosent hava roynt amfetamin
0,3 prosent hava roynt LSD
0,2 prosent hava roynt GHB

Tølini stava frá bóklinginum »Bóklingur til foreldur – Hent at vita um rúsevni«, sum Apoteksverkið og Fyribyrgingarráðið lótu útgeva í fjørsummar, og fevna tey um næmingar í føroyskum 9. flokkum. Tølini í bóklinginum stava frá kanningum ESPAD hevur gjørt í 2003.